

# EG ERI OV U
# AT LEGGJAS

**FERÐSLUÓHAPP** – Tað eru meiri enn 21 ár síðani, eg kom út fyri hesi ógvusligu ferðsluvanlukkuni. Men eg merki til tað hvønn einasta dag, tí eg liggi manga náttina í andvekri av berari pínu, og fái hvørki ligið ella gingið. Tá má eg bara seta meg í sofuna, soleiðis at eg kann sova eitt sindur, greiðir Eilif Jógvansson frá. – Mítt lív varð broytt eftir einum millisekundi henda novemberdagin í 1989. Og eg havi faktist bara innstillað meg uppá, at tað verður ongatíð tað sama aftur

Snorri Brend

**Skála:** – Eg havi vanliga eitt lætt og positivt sinni, men tað er forbankað hart at skula sita soleiðis og ikki sleppa til arbeiðis.

– Eg meini so við, – eg eri jú bara 50 ára gamal, og havi góða sjónátúr og góðan hug at arbeiða. Men tað er ótrúliga hart at noyðast at staðfesta og síggja, at eg ikki kann tað sama í dag sum eg kundi fyrr, sigur Eilif Jógvansson.

Ta einu løtuna var hann ein virkin útróðrarmaður, sum hevði sín arbeiðsstað í Leirvík. Og ta næstu løtuna gjørdist hann ein sundurknústur maður, sum ímóti mongum forsøgnum hevði yvirlivað eitt sera álvarsamt ferðsluóhapp.

Eilif er útlærdur maskinsmiður og hevur arbeitt sum slíkur á skipasmiðjuni í heimbygdini, eins og hann hevur arbeitt aðrastaðni á sjógvi og landi. Í dag kann bara droyma um at fáa eitt fulltíðarstarv aftur einaferð í framtíðini, hóast hann bæði hevur hugin og viljan í so máta.

– Í dag kann eg tað ikki, og tað má eg so bara bíta í meg. So tú skilir, at eg mangan føli meg totalt óbrúkiligan, tí eg ikki fái gjørt tað sum eg vil. Eg eri alt ov ungur til at leggja stilt.

– Hetta er eisini sera tyngjandi fyri meg og ikki minst fyri familjuna. Eg trúgvi ikki, at tað kann vera serliga stuttligt hjá konuni at hava meg gangandi rundan um seg soleiðis 24 tímar um samdøgrið, sigur hann álvarsamur.

– Hon hevur tíbetur verið ógvuliga tolin, og hevur hildið meg út líka til henda dag. Men tað er púra sikkurt, at sum støðan er í dag tekur man ikki lívið fyri givið.

## Hvat er galið?

Eftir ógvusliga ferðsluóhappið í 1989, ið eins væl kundi endað sum ein ferðsluvanlukka við deyðanum sum úrslit, kom Eilif at liggja á intensivu deild á Landssjúkrahúsinum, har allar hugsandi viðgerðir vórðu settar í verk.

Tað tók sína tíð, áðrenn Eilif kom til sín sjálvs aftur á sjúkrastovuni eftir tær nógvu skurðviðgerðirnar og allan tann pínustillandi heilivágin, soleiðis at hann yvirhøvur kundi eksistera.

– Ja, tú kanst bara ætlað tað stóra skiftið: Eg visti bara, at eg hevði verið á útróðrum og var á veg til hús. Og nú, tá eg klárnaði aftur, vóru so nógv øðrvísi ljóð at hoyra, samstundis sum alt var so stilt og øðrvísi rundan um meg.

– Eg hugsaði við mær sjálvum – hvar í víðu verð ert tú, Eilif? Eg skilti sjálvandi, at eg var ikki umborð á bátinum. Eg sat heldur ikki í bilinum. Og eg var heldur ikki heima við hús. Eg skilti ikki eitt einasta petti av nøkrum, tí eg hevði púra mist orienteringina, greiðir Eilif frá.

Starvsfólkini á Landssjúkrahúsinum vildu ikki beinanvegin siga honum, hvat var hent, hví hann lá í eini sjúkrasong og ikki í síni egnu. Hann visti tó og føldi, at okkurt álvarsamt var hent honum.

Umsíðir gekk tað upp fyri Eilif, at hann lá á einum sjúkrahúsi fullkomiliga í knúsi likamliga, og eisini sálarliga.

– Ein dagin kom konan, Helena á vitjan, og tá mátti eg bara spyrja hana: Hvat er skjett við mær? Hví eri eg her, og hvat er galið? Tá segði hon fyri mær, hvat var hent í Skálafirði, at tað hevði verið ein samanstoytur og at eg var komin sera illa til skaða. Eg skuldi bara vega fegin um at eg var á lívi.

– So spurdi eg hana, hví eg einki sá og hví okkurt var lagt fyri eygað á mær, so eg sá einki annað enn svart og myrkur. Tá fekk eg tey sjokkerandi boðini, at høgra eygað hevði hingið uttanfyri andlitið. Tað fór helst at viðføra tað, at eg neyvan fór at fáa sjónina aftur í høgra eyga, greiðir Eilif frá.

**» Knæið var endað í rattlásinum. Bringan var endað inni í róðrinum. Hjelmurin var endaður í andlitinum. Beinini vóru brotin inn undir setrið. Armarnir brotnir. Andlitið sundursorað. Kokubeinið var í knúsi. Og tað sum kanska var mest álvarsamt var, at hann bløddi úr bringuni og út gjøgnum munnin**

## Blendaða dunnu

Lækarnir fingu snikkað hann soleiðis saman, at hann kundi sleppa heim ein stuttan túr á jólum hetta árið.

Tað var ein nógv broyttur maður sum slapp heim til sethús síni Úti á Fløtum 22 á Skála, – hesi sethúsini sum tey vóru flutt inn í eitt ár frammanundan:

Í fyrsta lagi var likamið merkt av einum skurði fyri og øðrum eftir. Andlitið var samantvinnað við stáli sum tilsamans var 120 cm langt. Úr lendunum og niðureftir vóru 14 mm tjúkkar og 47 cm langar stengur festar. Og so var hann lætnaður úr 216 pundum og niður í 154 pund eftir bert einum mánaði.

– So tú skilir, at tað var lítið um meg, tá eg við hjálp av tveimum portørum kom akandi niðan trappurnar heima við hús, til jólahugnan í okkara heimi, sigur Eilif álvarsamur.

Til henda góða hugnan hoyrdi sjálvandi ein dunna sum jóladøgverði. Hini í húsinum gleddu seg sum vera man til hesa góðu máltíðina jólaaftan. Men Eilif hevði tað øðrvísi.

– Hvussu kundi eg gleða meg til tað? Munnurin hjá mær var jú læstur saman, so eg kundi bara fáa flótandi føði. Og her hevði familjan stríðst fyri at gera tað so hugnaligt heima við hús, og høvdu riggað ein góðan jóladøgurða til okkum øll. Eg merkti angan av dunnuni í ovninum, men hvussu í víðu verð skuldi eg kunna njóta hana?

– Har gjørdist ikki annað hjá konuni enn at gera tað sama sum tey gjørdu á Landssjúkrahúsinum, at blenda henda góða jóladøgverðan – hesa góðu og vælangandi dunnuna – til mín. Men hann gagnaðist mær als ikki, hóast tey í húsinum høvdu stríðst fyri at gera dunnuna so lekra sum gjørligt.

– Tú skilir, – at skula eta ársins jóladøgverða sum blendaðan kost og so enntá gjøgnum eitt súgvirør millum tenninar. Og eg, sum altíð havi dámað so væl góðan mat?, sigur hann álvarsamur.

## Til arbeiðis

Eftir drúgva viðgerð og nógv stríð fyri at koma fyri seg aftur, og soleiðis at hann kundi tryggja familju sína fíggjarliga, gjørdist Eilif líðandi so væl fyri, at hann kundi byrja at hugsa um at finna sær eitt arbeiði, 10 ár eftir óhappið.

Hetta var ikki ein ynskistøða, tí tað vísti seg at vera sera trupult at fáa tey innan almannaverkið at skilja støðu hansara, og geva honum ein virðiligan stuðul vegna óarbeiðsførið sítt.

– Eg hugsaði nógv um støðuna tá, og mátti bara taka eina avgerð. Eg kundi ikki fáa eitt einasta oyra frá Almannastovuni tá, og spurningurin var sjálvandi, hvat ger man so. Eg føldi meg sum eina lús ímillum tvær negl, tí tað var ikki annað hjá mær at gera enn at fara til arbeiðis, hóast eg als ikki føldi meg likamliga føran fyri tí.

Eilif var heppin, og fekk ar-